## Skrá fyri Bygdastevnuna á Skála í døgunum 20. - 23. mai

**Leygardagur 22. mai**

kl. 09.00 **Fótbóltur.** Skála, B68, EB/Steymur, NSÍ, pinkur.
kl. 11.00 **Fótbóltur.** Skála b, GÍ b, NSÍ b, KÍ b, gentur 10-12 ár.
kl. 13.00 **Fótbóltur.** Skála b – KÍ b, smágentur.
kl. 14.00 **Fótbóltur.** Skála a – NSÍ a, smágentur.
kl. 16.30 **Stevnan verður sett í høllini av Kára Johannesen bygdaráðsformanni.**
kl. 16.45 **Tivoli letur upp** við bamsutombola, blandaðum tombola, 21-spæli, fiskidammi, skreiðiborg, hoppiborgum, gladiatorbana, esli, »high striker« fyri børn, sumoglíming fyri børn, og sumoglíming fyri vaksin.
kl. 17.00 **Barnakórið av Skála syngur.**
kl. 18.00 **Angela og Ásbjørn** undirhalda í høllini.
kl. 19.00 **Vørutombola í høllini.**
kl. 21.30 **Birgir og Jónsvein** undirhalda í høllini.
kl. 23.30 **Dansur.** Góður enskur dansur við Hjalta Joensen og vinmonnum í bygdasalinum.

**Sunnudagur 23. mai**

kl. 11.00 **Familjugudstænasta.** Jógvan Fríðriksson, prestur, prædikar.
kl. 11.00 **Morgunmøti í Nerija.**
kl. 12.30 **Súkklukapping fyri vaksin.** Frá læknahølunum til Gøtueiði og aftur.
kl. 13.45 **Súkklukapping fyri børn.** Súkkla verður frá læknahølunum inn á Mann og aftur. Býtt verður upp í aldursbólkar gentur og dreingur. Luttøkugjaldið er 20 krónur. **Øll skulu vera í hjálmi.**
kl. 14.30 **Tivoli letur upp** á kajøkinum.
kl. 14.30 **Caféin í spælistovuni letur upp**.
kl. 15.00 **Kappróður.** Steypini verða handað á kajøkinum beint eftir seinasta róðurin.
kl. 16.00 **Undirhald á havnaøkinum niðan fyri El-Service.** Kapprógving við gummibátum, eisini verður møguleiki fyri at súkkla um kapp á flakum ið liggja á sjónum, o.a.
kl. 17.00 **Bingo í bygdasalinum.**
kl. 18.00 **Fótbóltur.** Skála - B68, 1. deild.
kl. 19.00 **Ytrimissiónsmøti** í Meinigheitshúsinum við Snorra Brend.
kl. 20.00 **Brotssparkskapping á vøllinum fyri vaksin og børn.**

## Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA

verða á **Klaksvíkar Sjúkrahúsi** 15. og 16. juni og á **Landssjúkrahúsinum** 17. juni 2004.

Tíð fæst við at ringja á **tlf. 45 54 63**, týsdag og mikudag kl. 10-12, í seinasta lagi týsdagin 8. juni 2004.

## Frá S & K felagnum

S & K felagið bjóðar til kunnandi fund á Restaurant Muntra í Fuglafirði týsdagin 25. mai 2004 kl. 20.30

Skrá:
- Kunning um S & K felagið
- Lønarsáttmálan
- Eftirlønargrunnin
- Lívstryggingarskipanina

eisini ber til at seta nevndini fyrispurningar

Limir felagsins og annars øll áhugaði eru vælkomin.

Við á fundinum verður nevndin hjá S & K felagnum

Felagið bjóðar kaffi og te

Vinarliga

**S&K-felagið**

Sosialurin 341800

Landsfelag Pensjónistanna

## Útferð til Ísland tann 9. juni

Pensjónistafelagið HØFT boðar frá, at vegna sjúku eru 2 pláss tøk.

Um onkur ætlar sær við, skal ringjast á tlf. 371150.

**Landsfelag Pensjónistanna**

## Ger kvetti!

**OPEL ASTRA 1,6**

OPEL

**Metalsvartur árg.06.02, sum nýggjur**

**BERT 105.000,- KR**

**Ring 265 563**

Sosialurin



## BILUR VIÐ SKAÐA TIL SØLU!

Fyri P/F Trygd selja vit ein Fiat Brava 1,9 JTD Diesel við skaða. Bilurin er árgang 2000, hevur koyrt uml 36.000 km, og verður seldur sum hann stendur fyri hægsta boð.
Bilurin kann síggjast hjá P/F Reyni Service í Hoyvík og myndir av honum eru at síggja á heimasíðuni hjá Trygd: www.trygd.fo

Sosialurin 341800

**REYNI SERVICE** P/F

Bilasølan - Vegurin Langi - 188 Hoyvík - Tel. 353040

## Skúlastýrisvalið á Tvøroyri

Valið til skúlastýrið á Tvøroyri verður í handarbeiðsstovuni í Tvøroyrar skúla tann 25. mai 2004.

Valhølið er opið frá kl. 14.00 til kl. 20.00.

Veljarar, sum ikki kunnu møta á valdegnum, kunnu við at venda sær til formannin í valnevndini á tlf. 371582 atkvøða við brævatkvøðu í seinasta lagi tann 24. mai kl. 18.00.

**Valnevndin**

## Á ALTJÓÐA TÓNLEIKARAPALLIN

- KONSERTFERÐ OG MARKNAÐARFØRING -

Lær um hetta á tónleikaraskeiði hjá LISA tann 25.05.04 kl. 19 í GHM stovuni í Tórshavnar Musikkskúla, Frúutrøð 1.

Sigrid j. Dalsgaard, samskipari hjá TÝR og Kristian Blak frá TUTL siga frá sínum royndum viðvíkjandi at skipa fyri konsertferðum, marknaðarføring og at skapa sølumarknað uttanlands.

Skeiðið er ókeypis og ætlað øllum, ið vilja royna seg á altjóða marknaðinum.

**Tilmelding á:**
320197 og 264831ella á lisa@lisa.fo

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480




# Kolonial og skógvar

**Hans Petur og Poula Ellingsgaard, sum eiga kiosk Vár í Saltangará og Klaksvík hava nú víðkað um teirra virksemi og latið ein skógvahandil upp**

HANDIL

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Mikudagin lat ein nýggjur skógvahandil upp í Klaksvík. Pattino eitur hann, og eigararnir eru Hans Petur og Poula Ellingsgaard.

Tey bæði hava drúgvar royndir innan handilslívið. Tey hava havt kiosk Vár í Saltangará í 20 ár, og fyri trimum árum síðani lótu tey upp kiosk Vár í Klaksvík. Og mikudagin lat so Pattino upp.

Poula sigur, at hon hevur hugsað um at latið upp ein skógvahandil í fleiri ár, men hon hevur ongantíð gjørt nakað veruligt við tað. Men so var tað, at ein skógvahandil í Klaksvík lat aftur, og Poula keypti so innbúgvið úr tí handlinum og lat sín egna upp í snotiligu hølunum aftan fyri kioskina.

Framman undan var bert tann eini skógvahandilin í Klaksvík, so sigast kann, at Poula hevur valt ta røttu tíðina at lata nýggjan handil upp.

Hon sigur, at hon varð heilt bilsin av nógvu undirtøkuni, sum handilin fekk fyrsta dagin.

– Her vóru so nógv fólk allan dagin, og vit seldu eisini heilt fitt. Eg var næstan skelkað, og nú vænti eg ikki, at tað koma fleiri restina av hesum mánaðinum, sigur hon flennandi.



*Poula Ellingsgaard, eigari av nýggja skógvahandlinum, Pattino, í Klaksvík. Hon er sera spent uppá, hvussu tað fer at ganga og metir, at eitt ár skal til fyri at staðfesta, um tað ber til ella ikki*

### Fjaldur handil

Pattino liggur sum sagt í bakhølunum í kiosk Vár. Onkur hevur ført fram, at handilin liggur so fjaldur av tí sama. Men hesum er Poula als ikki samd í.

– Tað kemur eitt skelti á veggin framman fyri, og so er handilin ikki meira fjaldur enn til dømis Total, sigur hon.

Total er ein mótahandil, sum liggur á aðru hædd í sama bygningi. Ein klædnahandil og skógvahandil í sama bygningi kann bara vera gott, sambært Poulu.

Poula heldur, at tað man fara at ganga fínt við teimum báðum skógvahandlunum, sum nú eru í býnum.

– Vit koma ikki at selja tað sama. Eitt nú ætli eg mær ikki at selja barnaskógvar, greiðir hon frá.

Tey fara heldur at leggja seg eftir at selja skógvar, taskur og annað viðhoyr til vaksin fólk. Poula fer sjálv at reka handilin, men dóttirin, Oda, fer eisini at geva eina hjálpandi hond.

# Okkum tørvar ein uttanveltaðan flokk

**Stigtakararnir til nýggja borgarlistan til býráðsvalið í Havn, halda tað verða stóran tørv á einum politiskt óheftum flokki**

BÝRÁÐSVAL

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í seinasta blað skrivaðu vit um nýggja flokkin, ið fer at stilla upp til býráðsvalið í Havn í heyst. Flokkurin, ið ber heitið Havnarflokkurin, er eitt alternativ til verandi politisku flokkar, ið allir eru knýttir at ávísum politiskum hugsanum.

### Meiri pengar til tey gomlu

Ein av stigtakarunum til nýggja flokkin er Kartni Olsen. Hann sigur, at enn hevur flokkurin ikki heilt nágreiniliga stungið út í kortið, hvønn politik teir ætla at reka, men meiri sett nakrar yvirskriftir til tað, ið teir ætla at arbeiða fram ímóti.

Kartni Olsen sigur tó, at eitt av teimum málum, ið stórur dentur eigur at verða lagdur á beinan vegin, er eldraøkið. Tað er alneyðugt, at játtanin til tey eldru verður hækkað, so at umstøðurnar hjá teimum verða betraðar. Til dømis hevur tað seinastu tíðina verið nógv frammi í miðlunum um gomul fólk, ið eru innløgd á Landssjúkrahúsinum, tí tey ikki fáa nakra røktarpláss, hóast tey ikki eru før fyri at klára seg sjálvan.

Stigtakararnir til Havnarflokkin eru tó fullvæl greiðir yvir, at tað er avmarkað, hvussu nógvir pengar eru at arbeiða við, men sjálvsagt er tað eisini ein spurningur um raðfesting.

### Núverandi býráð hevur ikki sovið

Tað er ikki, tí at Kartni Olsen er ónøgdur við núsitandi býráð, at hann hevur verið við til at taka stig til nýggja flokkin. - Eg haldi ikki, at býráðið hevur sovið, tí tey hava fingið nógv gott av skafti, sigur Kartni Olsen, men leggur afturat, at tað er tó altíð okkurt, ið man sjálvur hevði gjørt øðrvísi.

Í skrivi, sum stigtakararnir til Havnarflokkin sendu fjølmiðlunum í vikuni, stendur at lesa, at millum annað við flokkurin leggja dent á eitt nú bátahavnina í Vágsbotn. Tað er ikki nakað dulsmál, at hetta er hjartabarnið hjá Kartna Olsen, sum eisini er formaður í Tórshavnar Bátafelag. Hann sigur tó, at hetta skal ikki skiljast sum um, at hann persónliga er ónøgdur við tað, sum Tórshavnar Býráð í verandi valskeið hevur gjørt fyri at bøta um umstøðurnar hjá smábátum í Vágsbotni. - Sum formaður í Tórshavnar Bátafelag eri eg væl nøgdur við tað, sum býráðið hevur gjørt fyri bátaeigararnar seinastu árini. Millum annað eru fýra milliónir brúktar upp á økið fram við Bakkahellu nærheindis felagshølunum hjá bátafelagnum, og vit skulu eisini minnnast til, at pengarnir eru avmarkaðir, so alt kemur ikki í einum, sigur Kartni Olsen.

Síðsta summar vóru stórir trupulleikar í Vágsbotn, tí har luktaði so illa, men nú er bøtt um hetta. Kartni Olsen sigur, at hjá teimum okkurt um 100 fremmandu bátunum sum vitjaðu í Vágsbotni í fjør, var ikki altíð líka hugaligt at sita á dekkinum ella bryggjuni og fáa sær ein kaffimunn ella ein bita, tí tað luktaði so ómetaliga illa. Hetta er nú bøtt um, og tað er sjálvsagt at fegnast um, sigur hann.

Sum vit eisini umrøddu í seinasta blað, ætlar nýstovnaði Havnarflokkurin at leggja dent á eitt nú ferðavinnu, handilslívið mentanarlívið og at skapa karmar fyri einum virknum framleiðsluskapandi vinnulívi í høvuðsstaðnum. Flokkurin er av teirri hugsan, at karmarnir hjá framleiðsluvinnuni í Havn ikki eru nøktandi, og í næstum fer flokkurin óivað at koma við einum útspæli, har greitt verður frá, hvussu hesir karmar kunnu betrast.